## Spurningar og svar

**24-09-2024**

Vit hava fingið tríggjar spurningar aftrat.

1. Hvussu nógv tilboð kann hvør fyritøka senda inn?
2. Hvat er kravt leveringstíðin á vøru sum er umbiðin?
3. Er tað møguligt at geva 2 tilboð, uppá 2 ymiskir stólar ?

*Ad 1 og 3)*

*Vit hava tikið avgerð um, at veitarar kunnu í mesta lagi senda inni tilboð uppá tríggjar stólar. Tvs. trý tilboð eitt fyri hvønn stólin.*

*Ad 2) Veitingardagurin er settur til 20.11.2024. Væl vitandi um, at veitingartíðir kunnu vera truplar, er dagfestingin ikki so alt avgerandi. Tað ber tó ikki til at fara út um 1. februar 2025.*

**19.09.2024**

Spr. 1: *Er nakað krav um at stólurin skal verða heilpolstraður? Also at bæði setur og rygglen er polstrað? Og er nakað krav um at tað skal verða leður ella skulu vit komað við tí vit halda er best viðvíkjandi hvat polstur verður brúkt?*

Svar 1. Gjaldstovan hevur ikki nøkur ynski um polstring ella krøv um nakra serliga polstring. Víst verður annars til góðskukrøvini. Er talan um polstring, skal man tó gera sær greitt, at eitt av góðskukrøvunum er virkisføri, viðlíkahald og reingerð.